# Skjót ryggviðgerð er góð íløga

**Ein av fyrtu mánaðunum næsta ár letur upp ryggambulatorium á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Við at geva fólki við ryggjtrupulleikum hjálp beinanveg slept undan fleiri skurðviðgerðum. Nógvur peningur er at spara, sigur Jákup Petersen, yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi**

Randi Jacobsen

Við teimum privatu sjúkrahúsunum í grannalondunum er talið av ryggjskurðviðgerðum økt, tí lættari er at sleppa ftramat. Hetta er skeiv gong, halda heilsustýrini í londunum.

Hetta hendir, sjálvt um grannalondini hava ryggambulatorir við endamálinum at veita fólki hjálp, so tey seinni ikki noyðast at verða løgd undir skurð.

Heilt nógvir føroyingar fara niður at fáa skurðviðgerð fyri eitt nú diskosprolaps og aðrar sjúkur í rygginum.

Hetta eigur ikki at vera neyðugt so ofta, helt Jákup Petersen, sum fór til Heilsumálaráðið við hugskotinum um at stovna ryggambulatorium á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

### Væl dámt

– Bæði Aksel Johannesen, landsstýrismaður og Landssjúkrahúsið tóku væl ímóti hugskotinum, tí øll duga at síggja, hvussu nógv ílegan kann geva aftur, sigur Jákup Petersen.

Hann sigur, at ein stórur partur av fólkunum, sum hava trupulleikar við rygginum, kundu sloppið undan skurðviðger, um tey bara fingu røttu viðgerðina í góðari tíð. Tíverri hendir tað ofta, at fólk ikki fara til lækna við sínum trupulleikum, fyrr enn ov seint, og brekið er vorðið verandi.

– Sjálvandi verða altíð nøkur, sum ikki kunnu sleppa undan skurðviðgerð, men við einum ryggambulatorum kundu vit hjálpt nógvum uttan at skurðviðgera tey, sigur Jákup Petersen.

### Nógv at spara

Tað verður ein stór sparing fyri samfelagið, tá ið ryggambulatoriið kemur í gongd. Tað slepst ungan longri sjúkrameldingum, skurviðgerðirnar kosta nógv, og tað kostar somuleiðis nógv at senda sjúklingar við ella uttan fylgjarar til Danmarkar.

Aftrat tí kemur alt tað menniskjaliga við at sleppa fólki undan at verða løgd undir skurð.

Tað hevur eitt sindur av útreiðslum við sær at seta ryggambulatorum á stovn. Nakað av útgerð krevst, og nakað skal brúkast til útbúgving av starvsfólki.

– Men tann íløgan kemur fleirfaldað innaftur, sigur Jákup Petersen.

Á ryggambulatoriinum fara at arbeiða giktalæknar, fysioterapeutur og ein ortopedur.

Jákup Petersen er einasti lækni, sum í Føroyum ger ryggskurðviðgerðir, og hann skal seta ambulatoriið í gongd.

– Aksel Johannesen, landsstýrismaður og eg eru samdir um, at ambulatoriið skal byrja ein av fyrstu mánaðum í komandi ári, sigur Jákup Petersen.



*Jákup Petersen, yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi stendur fyri ætlanini um at lata upp ryggambulatorii*

---

# Heimarøkt er fyribyrging

**Góð heimarøkt er neyðug, skulu vit liva upp til málsetningin um, at gomul eiga at búgva heima sum longst. Tað heldur Majbritt Mohr, forkvinna í Almanna- og Heilsurøktarafelagnum**

Randi Jacobsen

Starvsfólk í Nærverkinum halda lítið um tær sparingar, sum nú verða framdar í Heimarøktini og í Serforsorgini.

Limirnir í Almanna- og Heilsurøktarfelagnum arbeiða ikki í heimarøktini, men teir eru á røktarheimum, sambýlum og bústovnum.

Á summum av hesum stovnum skulu fólk setast niður í tíð.

– Á bústovnum átti starvsfólkatalið heldur at verið uppnormerað. Nógv av teimum, sum búgva har, brúka nógvan heilivág, og tí er ikki rætt næstan bara at seta pedagogar og starvsfólk at arbeiða á hesum stovnum, sigur Majbritt Mohr, forkvinna í Almanna- og Heilsurøktarfelagnum.

Hon heldur tað vera løgin raðfesting at spara so nógv í heimarøktini.

– Heimarøktin ger eitt stórt fyribyrgjandi arbeiði, og skulu vit bara so nøkulunda liva upp til málsetningin um, at gomul skulu búgva sum longst í egnum heimi, má heimarøktin vera góð, sigur Majbritt Mohr.

Øll reingerð er nú spard burtur, og tað er ikki beint, heldur hon, men leggur aftrat, at reingerð eigur at verða veitt gomlum heimabúgvandi.

### Følna skjótari

– Vit vita, at gomul fólk følna skjótari, um tað ikki er hampiligt uttan um tey, og tað er eisini virðiligari. Men reingerð er ikki alt. Tað hevru stóran týdning fyri tey gomlu, at heimahjálpin kemur inn at práta, og heimahjálpin kann eisini eygleiða, um nakað er galið, um tey eru í ørviti o.a. sigur Majbritt Mohr.

Ein álvarslig avleiðing aftrat av sparingunum verður, at heimahjálpirnar verða minni nøgda við sítt arbeiði og fara at mistrívast av øktu arbeiðsbyrðuni.

Hon væntar, at sparingin í heimatænastuni fer at økja um trýstið á røktarheimini.

Majbritt Mohr er samd við teimum, sum halda, at alt apparatið rundan um Nærverkið er bólgnað av nógv.

– Vit hava sæð tað seinastu 10-12 árini, at eitt starv fyri og eitt eftir er komið aftrat. Tað ber ikki til at seta so nógv nýggj leiðarastørv, tí tey skulu jú gjaldast. Tað verður ov langt millum loft og gólv. Raðfestingarnar eru so løgnar. Kanska hevði tað verið eitt hugskot at sett seg niður á gólvið og mett um, hvat vit vilja, sigur Majbritt Mohr.

## Fólk liggja óhjálpin heima

**Við seinastu sparingunum í heimarøktini er spurningurin um vit hava nakra heimarøkt longur, sigur Ása Holm, forkvinna í Heilsuhjálparafelag Føroya**

Randi Jacobsen

Í heimarøktini eru øll forfard av, at ta enn eina ferð verður spart í hesi tænastuni.

– Vit harmast um hesar sparingarnar á eldraøkinum, tí har r so nógv spart frammanundan.

Hetta sigur Ása Holm, forkvinna í Heilsuhjálparafelag Føroya. Hetta er fakfelagið hjá heimahjálpunum.

Ása Holm sigur, at limirnir kenna seg ótryggar bæði egna vegna og vegna tey gomlu.

– Eg eri samd í, at pínumarkið nú r nátt, sigur hon.

Tey gomlu, sum búgva í sambýli ella á røktarheimi, fáa í hvussu er eitt sindur av hjálp. Men úti um landi valdið ruðuleiki, og nú náttarøktin er spard burutr, liggja gomul fólk einsmøll og óhjálpin heima, sigur Ása Holm.

Felagið hevru fleiri ferðir mótmælt og sagt, at hesar sparingarnar eru óforsvarligar.

– Við hesum kunnu vit seta spurnartekn við, um vit hava nakra heimarøkt longur. Vit mugu eisini spyrja, hvør politiski viljin er, sigur Ása Holm.